Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka:

# Kursásetingin er nøktandi

**Tað er svenski Handelsbanken, ið hevur ásett kursin á partabrøvunum. – Tað er ein balansugongd, tí kursurin má verða áhugaverdur fyri íleggjarar, samstundis sum hann er nøktandi fyri landskassan, sigur Janus Petersen**

PRIVATISERING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Partabrøvini í Føroya Banka verða seld fyri ein kurs, sum liggur millum 162 og 189. Og tað er nøktandi, sambært forstjóranum í Føroya Banka, Janusi Petersen.

- Kursurin er ásettur av serfrøðingum, og teir hava jú tikið hædd fyri, at tað skal vera áhugavert hjá íleggarum at keypa partabrøvini, samstundis sum landskassin fær ein nøktandi prís, sigur Janus Petersen.

Forstjórin hevur annars úr at gera í hesum døgum. Í gjár og í dag hevur verið stórt fundarvirksemi við møguligar íleggjarar her heima í Føroyum, og frá í morgin verða framløgur av prospektinum í londunum uttan um okkum. Talan er um Ísland, Danmark, Finland, Svøríki og Ongland, umframt okkurt land í Miðeuropa.

Nógv hevur verið gitt um, hvørt arbeiðssteðgurin í síðstu viku fór at ávirka søluna og kanska serliga prísin á bankanum, men tað metti Eyðun á Rógvi ikki í sjónvarpinum í gjárkvøldið, og somu metan hevur forstjórin í bankanum eisini.

- Tað tykist sum tað er ógvuliga stórur áhugi fyri partabrøvunum í bankanum. Og tað er eisini lítið hugsandi, at ein slíkur stuttur arbeiðssteðgur fer at hava ávirkan á nakað, sum má metast at verða langsiktaðar íløgur, sigur Janus Petersen.

### Hyggja uttanlands

Forstjórin heldur, at privatiseringin av tveimum triðingum av bankanum fer at seta økt krøv til bankan, og at tað somuleiðis verður skapt eitt økt trýst á leiðslu og starvsfólk alla tíðina at betra um úrslitini. Men tað er sanniliga eisini ein spennandi avbjóðing.

- Tað fer at merkja, at størri áhugi verður fyri okkum sum fyritøka. Tað fer eisini at merkja eitt økt trýst á okkum, men tað meti eg er bara sunt. Men tað fer eisini at gera tað nakað léttari hjá okkum at røkka út um landoddarnar, tí vit gerast kendá partabrævamarknaðinum. Og gjøgnum henda verður léttari at fíggja tær verkætlanir, sum vit fara at arbeiða við, sigur Janus Petersen.

Privatiseringin fer eisini at seta nøkur fyrisitingarlig krøv. Bankin skal hereftir rekast meiri í tráð við altjóða reglugerðir. Tað merkir regluliga kunning til partabrævamarknaðin og eftirlit við, at upplýsingar ikki koma fyri skeivu eyguni, men til marknaðin fyrst og fremst. Stutt sagt fer Føroya Banki at verða rikin meiri professionelt í framtíðini.

Forstjórin sigur, at teir ikki í løtuni hava nakra ítøkiliga ætlan um at víðka virksemi bankans úteftir, men at tað heilt vist kemur.

- Høvdu vit nakra ítøkiliga ætlan í løtuni, hevði hon verið við í prospektinum. Men tað verður púra vist hugt tann vegin. Tað er ikki ein spurningur um, men nær vit víðka úteftir, sigur Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka.



*Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka*

Prospektið hjá Føroya Banka:

# Brynjar íleggjarar til rætta avgerð

**Eitt prospekt er ætlað at upplýsa møguligar íleggjar við fakta um fyritøkuna soleiðis, at íleggjarin hevur besta grundarlagið at taka røttu avgerðirnar útfrá**

PRIVATISERING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Inni á heimasíðu sínari gevur Føroya Banki komandi íleggjarum í bankanum góð ráð í sambandi við prospektið, sum bankin legði fram á tíðindafundi mánadagin. Har verður víst á, at tað er avgerandi fyri trygdina hjá íleggjarunum, at øll hava somu upplýsingar til taks. Hetta er neyðugt fyri at tryggja dagførda vitan um fyritøkurnar, sum íleggjarar kunnu velja at seta pening í. Og tí gera fyritøkur almennar roknskapir, prospekt og annað upplýsingartilfar.

Prospektið er gott at byrja við, tá tú skalt gera eina sunna og skilagóða íløgu. Her fært tú sum íleggjari allar upplýsingar um fyritøkuna, um vørur, tænastur, leiðslu, fíggjarligar og strategiskar ætlanir og váðar. At lesa prospektið er fyrsta stigið at gerast ein vitandi íleggjari, sigur Føroya Banki.

Eitt prospekt er eitt umfatandi skjal, ið skal framleiðast í sambandi við t.d. eina privatisering og sølu av partabrøvum til almenningin. ES og aðrir myndugleikar hava sett altjóða krøv um, hvat skal standa í prospektum. Innihaldið skal geva eina sanna og nøktandi mynd av øllum týðandi viðurskiftum hjá fyritøkuni, ið ætlar at selja partabrøvini. Myndugleikar skulu góðkenna prospektið, áðrenn tað kann vísast fram alment fyri møguligum íleggjarum.

Føroya Banki hevur í sambandi við privatiseringina og sølu av partabrøvunum hjá Fíggingargrunninum frá 1992 framleitt eitt slíkt prospekt.

### Framferðarhátturin

Fíggingargrunnurin frá 1992 valdi í 2006 Handelsbanken Capital Markets (HBCM) sum ráðgeva í privatiseringini. Hetta hevði millum annað við sær, at HBCM fekk høvuðsuppgávuna fyri prospektinum.

Fyrst varð avrátt við HBCM, hvat skuldi við í prospektið, og síðani var ein tíðarætlan løgd fyri arbeiðið. Farið varð so undir at skriva eina kladdu av prospektinum, har nærum allar upplýsingar vóru við, sum skuldu við í endaliga prospektið, undantikið eitt nú prísur og kostnaður. Hesa kladdu arbeiddu bankin, grunnurin og HBCM tætt saman um.

Tá kladdan var um at vera liðug, varð farið undir góðkenningartilgongdina. Bankin skal skrásetast á tveimum marknaðum, CSE og VMF/ICEX, men av tí, at ICEX varð valt sum fremsta skásetingarstað, fór mesta samskiftið fram við ICEX.

Tá prospektið varð góðkent, kundi sølan av partabrøvum byrja.

### Brynjaðir til rætta avgerð

Uppsetingin av prospektinum er oftast rættiliga ymisk, hóast øll prospekt byggja á somu reglur. Føroya Banki hevur valt at seta prospektið soleiðis upp, at tað fremur »forstáilsi«, og at ymsu evnini, ið náttúrliga hanga saman, verða viðgjørd í sama parti av prospektinum.

**Innihaldið er millum annað hetta:**

- søgan hjá fyritøkuni og ein frágreiðing um virksemið
- grannskoðaðir roknskapir fyri seinastu trý árini
- frágreiðing um ætlanirnar hjá bankanum
- frágreiðing um, hvør selur partabrøvini, og hvat inntøkurnar fara til
- ein frágreiðing av størstu váðunum, ið kunnu ávirka bankan
- upplýsingar um leiðslu bankans
- ein frágreiðing um, hvørji rættindi nýggir íleggjarar hava í sambandi við søluna

Fyri at taka bestu avgerðina krevjast upplýsingar. Prospektið er eitt krav sambært altjóða reglum og má bara umrøða fakta. Tí er prospektið eitt rættiliga gott upplýsingargrundarlag fyri íleggjarar. Íleggjarin hevur trygd fyri, at prospektið bara umrøður fakta, ikki søluprát ella marknaðarføring.

Prospektið gevur íleggjarum møguleika fyri sjálvir at skapa sær eina fatan av, hvørja fyritøku og íløgu talan er um, og at fáa svar upp á nógvar av teimum spurningum, ið vanliga stinga seg upp í tílíkum førum. Brynjaðir við fakta eru íleggjararnir betur fyri at taka røttu avgerðina, vísir Føroya Banki á.

Hjá áhugaðum íleggjarum ber til at lesa prospektið inni á heimasíðuni hjá Føroya Banka, www.foroyabanki.fo